



Ferðist í Sandoynni!



-og royni hugnaligu kaffistovu okkara í Húsavík

Ella royni eitt vikuskifti við:
- yvirnátting
- morgunmati
- døguröa
- nátturöa

Latið er upp fyri summar-hálvuna 1999

RING OG HOYR MEIRA

Café ´31 - Húsavík

v/ Eyðbjørg Nolsøe - tlf. 361116 - (heima 361403)

Stjóri á TK-Stovuni

TK-Stovan lat upp á vári 1997 sum eitt ítøkiligt úrslit av avtaluni um vinnuframasamstarv millum Føroya Landsstýri og donsku stjórnina. Hendan avtala varð staðfest í november í 1994 og varð endurnýggjað á vári í 1998.

Endamál TK-Stovunnar er at menna og styrkja føroyskt vinnulív. Fyrst og fremst skal TK-Stovan ráðgeva fyritøkum, miðla nýggja vitan, sum er viðkomandi í vinnulívinum við at kunna um og ráðgeva føroyskum fyritøkum um galdandi føroyskar og danskar vinnuframaskipanir. Arbeiði TK-Stovunnar tekur støði í tørvi vinnunar og fer fram í samstarvi við aðrar føroyskar vinnuframastovnar, eitt nú Menningarstovu Landsins. TK-Stovan heldur til í Tórshavn. Á stovuni arbeiða í lotuni trý fólk.

Arbeiðið:

Sum leiðari hevur tú ábyrgdina av dagligu leiðslu stovnsins og hevur ábyrgdina av rakstrinum. Leiðarin ábyrgdast móti nevndini.

Við støði í strategi stovnsins skalt tú gera og fremja virkisætlan og málsetningar, sum eru lagað til tørv vinnunar. Ein týðandi partur av arbeiðinum er at viðlíkahalda og styrkja sambandið við samstarvsfelagar í Føroyum eins væl og í øðrum londum.

Tað er ein treyt at tú við síðuna av leiðsluarbeiðinum eisini røkir beinleiðis sambandið við virkir/fyritøkur og virkar sum ráðgevi.

Vit rokna við at tú
- hevur hollan kunnleika til føroyskt vinnulív og føroyskan vinnupolitikk. Kennir væl til vinnufeløg og í ávísan mun kennir til vinnuviðurskifti í grannalondum okkara
- hevur leiðsluroyndir í vinnulívinum
- hevur tøkniligan/handilsligan ástøðiligan førleika
- ert víðfevndur, heldur enn at fara í smálutir, fær eyga á møguleikar
- ert virkisfúsur, initiativríkur, motiverandi og dugir at fáa fólk at samstarva
- dugir føroyskt og danskt flótandi bæði í talu og skrift
- skilur og dugir at tala enskt og dugir at arbeiða við teldu á brúkarastøði.

Vit kunnu bjóða tær

Mennandi avbjóðingar, har tú fært møguleikan at vera við í arbeiðinum at menna føroyskt vinnulív. Løn sambært avtalu.

Meira um arbeiðið

Vilt tú vita meira áðrenn tú søkir, ert tú vælkomin at tosa við Martin Jakobsen, núverandi leiðara, tlf. 31 73 66.

Umsóknin skal sendast TK-Stovuni, Niels Finsensgøta 37, 100 Tórshavn **í seinasta lagi 31. mai 1999.** Merk umsóknina »Stjóri«.

Undirvísingar- og Mentamálastýrið

Málsviðgeri

Starvið

Í sambandi við at eitt av starvsfólkum okkara er farið í annað starv, er eitt áhugavert og fjølbroytt starv sum málsviðgeri leyst at søkja á prógvstovuni.

Høvuðsuppgávurnar verða m.a. at:
- Málsviðgerða
- Samskipa og fyrireika ymiskar arbeiðsuppgávur á prógvstovuni (innstilling til prógvtøku, skemalegging, tekstuppgeving o.a)
- Saman við uppgávunevndum o.ø., gera prógvtøkuuppgávur klárar til prentingar (skriva tekstir, gera uppseting (lay out) o.a.)
- Prenta, pakka og senda prógvtøkuuppgávur til allar skúlar í skúlaverkinum
- Umsita virkisøki, sum verða løgd til prógvstovuna (t.d. samskifti við prógvdómarar o.o.).
- Avgreiða samsýning fyri prógvdøming.

Førleikakrøv

Vit vænta okkum m.a. at umsøkjari hevur:
- Útbúgving og/ella royndir í skrivstovuyrkinum ella øðrum, Ið kann javnmetast við hetta
- Góðan kunnleika í nýtslu av edv (windows, word, access, excel, power point, page maker og photo shop)
- Góðan kunnleika til føroyskt
- Góð samstarvsevni
- Førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- Skal kunna arbeiða undir tíðartrýsti.

Vit bjóða

Starvið er spennandi við nógvum skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir.

Sjálvstøðugt starv við møguleikum fyri bæði persónligari og fakligari menning.

Tú kemur at arbeiða í einum spennandi umhvørvi við skiftandi uppgávum innan undirvísing og mentan.

Setanar- og lønartreytir

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið í 12. lønarflokki.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um alt aðalstýrið, og allar deildir/stovnar tess.

Umsókn

Umsókn við prógvum o.ø. skulu sendast til:

Undirvísingar- og Mentamálastýrið
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 17. mai 1999 kl. 15.00.

Starvið verður at seta skjótast til ber.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Bjarna Wilhelm, fíggjarfulltrúa í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum, tlf. 35 50 50.

__Undirvísingar- og Mentamálastýrið__ hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.
Í __aðalstýrinum__ eru stáðsfunktiónir innan m.a. løgfrøði, búskap, kunningartøkni og fyrisiting. Fyriskipanin er býtt í 3 deildir – fólkaskúladeild, vinnu-/miðnámsskuladeild og mentamáladeild – sum stáðsfunktiónirnar veita ráðgeving til, umframt til aðalstjórán og landsstýrismannin. __Prógvstovan,__ sum er í fyrisitingarpartinum av stáðinum, hevur til uppgávu at umsita teim praktisku viðurskiftunum prógvtøkuni viðvíkjandi so sum gerð og prenting av prógvtøkuuppgávum og annars at samskifta við uppgávunevndir, prógvdómarar og skúlar.